# Scholes fær finalu

Venjarin hjá Manchester United, Sir Alex Ferguson, er ikki kendur sum nakar bleytur ella sentimentalur maður, men hann viðgongur, at í einum føri vil hann gera eitt undantak. Um Manchester United í ár kemur í finaluna í Champions League, so skal miðvallarin Paul Scholes spæla dystin. Scholes, sum hevur verið millum trúgvastu og bestu spælararnar hjá United seinastu 10 árini, varð leikbannaður í 1999, tá ið enska felagið vann Champions League.



# Amager í Turkalandi

Danska felagið FC Amager, har fleiri føroyskir spælarar spæla, er í hesum døgum í Antalya í Turkalandi á venjingarlegu. Á venjingarleguni verður fínpussingin til kappingina í 2. Deild vestur gjørd. Kappingin byrjar tann 20. Mars. FC Amager skal venja tvær ferðir um dagin, og ætlanin er eisini at spæla onkran venjingardyst.

Neistin - KÍF 31-20 (12-8):

# Neistin manglar tvey stig

**Neistin hevði ongar trupulleikar, tá kollfirðingar vitjaði í høllini á Hálsi í gjár. Heimaliðið var klárt omaná og vann við heili 11 málum. Nú mangla tvey stig, áðrenn teir kunnu staðfesta finalusessin. Tað verður tó alt annað enn lætt**

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Nú mangla einans tvey stig, áðrenn Neistin kann staðfesta sítt pláss í finaluni. Hetta er staðfestingin eftir, at teir í gjár vunnu greiðan sigur á heimavølli móti botnproppinum úr KÍF. Tað er tó alt annað enn tvær lættar uppgávur, sum bíðar havnarfelagnum. Nærmastu kappingarneytarnir úr Kyndli og StÍF eru eftir á leikskránni, har annar dysturin má vinnast - um Kyndil vinnur allar sínar, væl at merkja. Neistin er farið undir fyrireikingarnar, har leikararnir í gjár nýttu høvið at royna ymiskt í gjár. Tað var tíðin og plássið í øllum førum til móti kollfirðingunum, sum einans vilja hava seinastu tveir dystirnar av kappingarárinum afturum.



*Enn er Neistin ikki farin at vísa tekin um gummibein í dystinum um at røkka FM-finaluni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Lítil ferð

Var hugt at stigatalvuni undan dystinum, so var ikki torført at hugsa sær til, hvønn vegin sigurin skuldi fara. Hetta tóktist eisini vera í huganum á heimaliðnum fyrstu løtuna, sum ikki tóku uppgávuna í størsta álvara. Lítil ferð var á spælinum, og hóast málverjin Jacob Larsen, sum stóð seg sera væl, royndi at fáa lív í viðleikararnar, so skuldi helmingurin av fyrra umfarinum ganga, áðrenn teir raknaðu við. Ikki tí, KÍF megnaði als ikki at gera sær dælt av hesum, og munurin millum liðini øktist eisini við tíðini. Serliga var Tróndur Kragesteen væl spælandi, og hann hótti mótstøðuliðið í heilum. Hann skoraði seks mál.

Við Rógva Weihe á odda, vardi KÍF í løtum sera væl. Tað hevði við sær, at munurin í fyrra hálvleiki ongantíð gjørdist meira enn fimm mál. Í framrættaða spælinum kom Damir Oros ongantíð fyri seg, og sjáldan eydnaðist lítlu kollfirðingunum at skjóta útifrá. Støðan í hálvleikinum var 12-8 til Neistan.

## Staðfesta sigurin

KÍF var betur við frá byrjan í seinna hálvleiki, og einu løtuna vóru tvey mál á muni - 16-14. Nærri komu gestirnir ikki, og Neistin fekk av álvara tamarhald á dystin. Áki Mørk syrgdi skjótt fyri, at spenningurin hvarv, og seinasa stóra løtan var minti meira um eina hugnaløtu. Teir royndu til tíðir ymiskt hugvekjandi, og KÍF hevði til síðst ikki hug at spæla við longur. Tað sást aftur í, at Ási Dam sá reytt móti endanum. Hóast onkur vildi vera við, at tað ikki var hann, sum segði óvikvæmisorð við dómaran, so máttu unglingin leiðina av vøllinum.

Neistin vann við 31-20, og eru so smátt farnir undir fyrireikingarnar til stóru uppgávurnar, sum standa liðnum fyri framman.

## FAKTA

**Neistin - KÍF 31-20 (12-8)**
10 min.: 5-3
20 min.: 7-4
40 min.: 16-14
50 min.: 24-16
**Neistin:** Áki Mørk 7, Tróndur Kragesten 6, Dann Torleifsson 6, Bogi Berg 5, Carl Herup Olsen 3, Jugoslav Djumic 2, Jóhann Brekkstein 2.
**KÍF:** Regin Petersen 5, Rógvi Weihe 4, Jákup Trúgvason 3, Damir Oros 3, Dejan Jankovic 2, Niklas Reginson 1, Ási Dam 1, Teitur Joensen 1.
**Útvísingar:** Dann Torleifsson 1, Carl Herup Olsen 1, Jugvoslav Djumic 1, Karl Odmar Rasmussen 1, Neistin - Jóan Pauli Olsen 1, Ási Dam 1, Niklas Reginsson 1, Dejan Jankovic 1, Jákup Trúgvason 1, KÍF.
**Dómarar:** Rúni Mohr og Ragnar

# EB/Streymur staðfesti favorittheitið

**EB/Streymur verður roknað sum ein av favorittunum til FM-gullið í ár, og teir vóru eisini sterkasta liðið í Klaksvíkskappingini um vikuskiftið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

EB/Streymur var sterkari enn hini liðini í Klaksvíkskappingini um vikuskiftið, og bæði leygardagin og sunnudagin vann felagsliðið 3-0.

Leygardagin spældi EB/Streymur ímóti B36, og tað gekk javnt á, til B36 misti ein spælara eftir góðar 20 minuttir. Dmitri Jankovic fekk reyða kortið eftir eina ósortliga takkling, og so noyddist B36 at spæla 10 móti 11 í 70 minuttir.

Í seinna hálvleiki sást hetta aftur, og tá skoraði EB/Streymur málini, sum teir høvdu fyri neyðini, fyri at vinna dystin.



*EB/Streymur hevur støðugt verið nevnt millum favorittarnar til komandi kappingarárið. Og tað heitið livdu teir upp til í Klaksvík*
*Mynd: Sofus Debes Johannesen*

Hin hálvfinalan stóð millum føroyameistararnar NSÍ og vertirnar KÍ. Her gekk eitt sindur øðrvísi, enn tey flestu mundu havt roknað við, tí NSÍ kláraði ikki at koppa KÍ. Dysturin endaði við javnleiki, eftir at KÍ í seinna hálvleiki hevði verið nær við at avgera fleiri ferðir. Brotssparkskappingina vann KÍ.

## Aftur brotsspørk

Sunnudagin vóru seinnu dystirnir spældir í besta veðri í Klaksvík. Mest sum stilli, sólglottar, men kalt.

Dysturin millum B36 og NSÍ um triðja plássið endaði við javnleiki, og tað var í tráð við leikgongdina.

Hjalgrím Elttør legði NSÍ á odda, men Karoly Potemkin javnaði við brotssparki seint í dystinum.

Potemkin og Meinhardt Joensen brendu tó sín brotsspark í brotssparkskappingini, og so vann NSÍ dystin um triðja plássið.

Finalan stóð millum EB/Streym og KÍ, og her vann EB/Streymur 3-0. Fyrri hálvleikur var rímiliga javnur, men EB/Streymur fekk eitt mál. Í seinna hálvleiki hevði EB/Streymur munin og skoraði tvær ferðir afturat. Málini skutu Marcel, Hanus Eliasen og Sorin Anghel.

Eftir dystin handaði borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen, EB/Streymi Klaksvíkssteypið.

## Klaksvíks kappingin 2008

**Hálvfinalur, leygardagin 1. Mars**
**B36-EB/Streymur 0-3 (0-0)**
0-1: Fróði Clementsen
0-2: Marcel
0-3: Hans Pauli Samuelsen

**KÍ-NSÍ 1-1 (1-1)**
**KÍ vann 5-3 eftir brotssparkskapping**
0-1: Hjalgrím Elttør
1-1: Rodrigo

**Dystur um 3. pláss, sunnudagin 2. mars**
**B36-NSÍ 1-1 (0-0)**
**NSÍ vann 5-3 eftir brotssparkskapping**
0-1: Hjalgrím Elttør
1-1: Karoly Potemkin, br.

**Finala**
**KÍ-EB/Streymur 0-3 (0-1)**
0-1: Marcel
0-2: Sorin Anghel
0-3: Hanus Eliasen